deildin

# Tað eru bara tindarnir sum telja

Havnar Bóltfelag
Postsmoga 1333
FO-110 Tórshavn
www.hb.fo

**STOVNAÐ**
04.10.1904

**FORMAÐUR**
Steinfinnur Mittelstein

**MEISTARAR (19)**
1955, 1960, 1963, 1964, 1965, 1971, 1973, 1974, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1990, 1998, 2002, 2003, 2004, 2006

**STEYPAVINNARAR (26)**
1955, 1957, 1959, 1962, 1963, 1964, 1968, 1970, 1971, 1972, 1973, 1975, 1976, 1978, 1979, 1980, 1981, 1982, 1984, 1987, 1988, 1989, 1992, 1995, 1998, 2004

**GREIPUVINNARAR (12)**
1955, 1963, 1964, 1971, 1973, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1998, 2004

**Í BESTU DEILDINI (66 ár)**
1942-1943, 1945-

**Í EUROPA (13)**
Meistarakappingin 1999/00, 2003/04, 2004/05, 2005/06
Steypavinnar 1993/94, 1996/97, 1997/98
UEFA Cup 1998/99, 2008/09, 2007/08
Intertoto 1995/96, 2000/01, 2001/02, 2006/07, 2008/09

**Málið hjá sigursvandasta felagnum av øllum er framvegis tað hægsta, sum tað ber tí til at vera**



Fróði Benjaminsen verður uttan iva ein av krumtappunum á HB-liðnum, sum enn eina ferð meddar móti ovastu tindunum í føroysku fótbóltskappingini

Mynd: Álvur Haraldsen

2008 hagtølini siga, at HB vann silvurkrónurnar í landskappingini, og at úrtøkan í steypakappingini var pláss í hálvfinaluni. Fyri tey flestu mundi hetta verið mett sum gott kappingarár. Men í HB kendist hetta at vera stórt vónbrot. Felagið hevur vunnið nógv, og málið er á hvørjum ári at vinna bæði lands- og steypakappingina.

At tað í fjør miseydnaðist í báðum kappingunum kendist serliga meint, tí undan kappingarbyrjan tóktist vánirnar at vera heilt góðar. Manningin tóktist vera framúr góð, men kortini var árið eyðkent av, at tað ikki hilnaðist soleiðis, sum tað varð roknað við.

Sámal Erik Hentze, sum eftir summarsteðgin varð settur at vera annar av venjarunum, hevur í ár ábyrgdina av besta liðnum. Hjálparvenjari er Heðin Joensen. Felags fyri teir báðar er, at teir hava fingið sína fótbóltsuppaling í HB.

Undanfarnu árini hava fleiri, sum eru uppvaksnir í øðrum feløgum, verið við til at manna HB liðið. Tað eru framvegis spælarar, sum eru uppaldir aðra staðni enn í HB, á liðnum, men nú verður fyrst og fremst dúvað upp á egið tilfeingið, og onkrir úr HB, sum hava verið aðra staðni, eru nú aftur í felagnum. Kortini eru tveir, sum eru komnir aðra staðni frá, við í kappingini um plássini. Teir eru Símun Rógvi Hansen, sum kappast um plássið millum stólparnar, við Marcin David.

Í verjuni eru ungir spælarar við nógvum royndum við í kappingini um plássini: Mortan úr Hørg og Pætur Jørgensen, Rasmus Nolsøe og Poul Thomas Dam og Jón Nielsen, sum áður hevur roynt seg í Vágum og á Argjum. Og sjálvandi eisini Hans á Lag, sum tekur enn eitt tørn fyri felagið.

Fróði Benjaminsen er miðvallargeneralur. Aftrat honum eru eitt nú stríðsmenninir Ólavur í Ólavsstovu og Kári Nielsen og sera evnaríki Rógvi Poulsen, og í álopinum er kappingin hjá veteraninum Andrew av Fløtum stór frá eitt nú Pálli M. Joensen og Bjarna Jørgensen og Tróndi Sigurðsson, sum báðir eru komnir aftur av Argjum og í barndómsfelagið, og frá Christian R. Mouritsen, sum var skaddur mest sum alt kappingarárið í fjør.

Í HB verður tað mett at vera miseydnað, um einki skreyt verður vunnið fleiri ár á rað. Í hesum áratíggjunum hevur HB longu vunnið landskappingina í 2002, 2003, 2004 og 2006 ella annað hvørt ár síðani 2000. Hagtølini í steypakappingini siga, at HB hevur vunnið annað hvørt ár, síðani farið varð undir kappingina í 1955. Síðsti sigurin í steypafinaluni var í 2004, og tí er svongdin ikki minst eftir eisini at vinna ta kappingina. Tað eru bara tindarnir, sum telja!

## Hópurin hjá HB:

**MÁLVERJAR:**
Marcin Dawid (Áður spælt við VB/S)
Simun Rógvi Hansen (B71)

**VERJULEIKARAR:**
Mortan úr Hørg (VB/S)
Hans á Lag
Rasmus Nolsøe (TB)
Pætur Jørgensen
Poul Thomas Dam
Vagnur Mohr Mortensen
Rani Christiansen (AB)
Jón Nielsen (07Vestur, AB)

**MIÐVALLARAR:**
Kári Nielsen (B71, Skála)
Milan Kuljic (VB/S)
Rógvi Poulsen
Ólavur S. í Ólavsstovu (FS V)
Fróði Benjaminsen (B68, B36, Fram (Ísland))
Jóhan Eivind R. Mouritsen (TB)

Christian Mouritsen (Manchester City)
Kristin Mouritsen
Bjarni Jørgensen (KÍ, Skála, AB)
Páll Mohr Joensen (NSÍ)
Rókur av Fløtum Jespersen (FC Amager)

**ÁLEYPARAR:**
Andrew av Fløtum (Fremad Amager)
Tróndur Sigurðsson (AB)

**TILGONGD:**
Bjarni Jørgensen, KÍ
Tróndur Sigurðson, AB
Christian Mouritsen,Man City
Simun Rógvi Hansen, B71
Jóhan Eivind R. Mouritsen, TB
Rókur av Fløtum Jespersen, FCA
Vagnur Mohr Mortensen

**FRáGONGD:**
Tróndur Vatnhamar, B36
Jákup á Borg, B36
Christian Høgni Jacobsen, AB (Dk)
Hendrik Rubeksen, 07Vestur
Torkil Kollsker, 07Vestur
Janus M. Joensen, AB
Emil N. Leifsson, ÍF Føroyar

**VENJARI:**
Sámal Erik Hentze

**HJÁLPARVENJARI:**
Heðin Joensen


POLAR



Akkumulatorar • Battaríir • Løðitól • Invertarir • septorar og mangt annað

Sigmundargøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel 31 83 47
Fax 31 83 67
Fartlf 21 28 60
polar@polar.fo
www.polar.fo